**Almannamálaráðið**

2. oktober 2015
Mál: 15/00676
Viðgjørt: JTN

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**broyting í kunngerð um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a.**
(Tøkniligar broytingar)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 126 frá 17. desember 2014 um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a., verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 8, stk. 2, verða 2. og 3. pkt. orðað soleiðis:
"Fyri árliga inntøku frá 50.000 kr. til og við 54.999 kr. verður goldið 3.072 kr. um mánaðin. Fyri inntøku á 55.000 kr. ella hægri verður goldið 90 kr. meir um mánaðin, hvørja ferð árliga inntøkan hækkar við 5.000 kr."

**2.** § 16, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Stakur pensjónistur, hvørs árliga inntøka er frá 15.000 kr. til og við 19.999 kr., rindar 30 kr. fyri hvønn tíma. Stakur pensjónistur, hvørs árliga inntøka er 20.000 kr. ella hægri, rindar 3 kr. meir fyri hvønn tíma, hvørja ferð árliga inntøkan hækkar við 5.000 kr."

**3.** § 16, stk. 7 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 7.* Pensjónistar í hjúnalagi, hvørs samlaða árliga inntøka er frá 22.500 kr. til og við 29.999 kr., gjalda 30 kr. fyri hvønn tíma. Pensjónistar í hjúnalagi, hvørs samlaða árliga inntøka er 30.000 kr. ella hægri, gjalda 3 kr. meir fyri hvønn tíma, hvørja ferð samlaða árliga inntøkan hækkar við 7.500 kr."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almannamálaráðið, xx. Xxxx 2015

**Eyðgunn Samuelsen**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen